# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Elias Jacobsen í Syðrugøtu, vanliga nevndur Lias hjá Benadikt**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið kl. 20. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13 frá Filadelfia í Gøtu. Tey, ið vilja minnast Elias, kunnu lata Sambýlinum Gøtubrá eina gávu, konta í peningastovninum.

**Niclas Kunoy, føddur og uppvaksin í Kunoy, búsitandi í Keypmannahavn**, andaðist mánadagin, 94 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Esajaskirkjuni, Malmøgade 14 fríggjadagin kl. 12.

**Óli Debes, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin, 82 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin kl. 14.

**Erik Wenningsted Larsen** fer til gravar úr Kirkjugarskapllinum hósdagin 14. januar kl. 13. Tey, ið vilja minnast Erik, kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini eina peningagávu.

Fyri 30 árum síðan:

# Átjan maskinmeistarar fingu prógv



Í januar 1980 fingu 18 maskinmeistarar pógv á Føroya Maskinskúla.
Teir vóru: Poul Christiansen, Tummas A. Christoffersen, Finnbogi Hentze, Johan Hofgaard, Bogi Jacobsen, Magnus P. Jacobsen, Dánjal Joensen, Sámal Petur Lervig, Magnus H. Magnussen, Erling Heri Midjord, Harald M. Nattestad, Magni Olsen, Regin Olsen, Heðin Rasmussen, Poul Johan í Stovuni, Michael Strøm, Kristian Thorleifsson og Dánjal Vang. (Raðfylgjan er ikki tann sama sum á myndini)

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1980*

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 13. januar fyllir Andreas Debess (DIABA) 80 ár. Dagurin verður hildin á Tjarnargarði saman við familjuni.

**70 ára føðingardagur**
Hósdagin 14. januar verður Jafet Rasmussen í Søldarfirði 70 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. februar hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. februar frá klokkan 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl. 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður reception á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

Fyri 35 árum síðan:

# Býráðið flytur í gamla kommunuskúlan

Sosialurin skrivar leygardagin 11. januar 1975, at gamli kommunuskúlin í Havn nú verður brúktur til skrivstovuhøli. Seint í fjør flutti býráðið allar skrivstovudeildir sínar á Kirkjuvegi til gamla kommunuskúlan, og í løtuni flyta eisini Líkningarnevndin og Fólkayvirlitið. Deildirnar, sum hava verið stongdar í tveir dagar, lata upp aftur mánadagin.

### Børsen nýggjan blaðstjóra

Blaðið skrivar eisini at, sjónvarpsmaðurin Uffe Ellemann Jensen hevur tikið við sum blaðstjóri á Børsen eftir Erik Rasmussen. Uffe er kendur fyri frásagnir sínar í danska sjónvarpinumumbúskaparlig viðurskifti. Ein tíðindastubbi er eisini í blaðnum, um at svenski ríkisdagurin hevur samtykt at lækka pensiónsaldurin til 65 ár.

*Kelda: Sosialurin 11. januar 1975*



*Býráðshúsini á Vaglinum í 1975. Parkeraðir bilar, eins og pylsuvognur og kiosk*

## Dagurin

**13. januar. Tjúgunda halgi.** Jólini enda. Tá ið tey taldu jólini og kvøðu um alt tað, sum Sankta Mortan gav, kvøðu tey: tjúgu stútir, nú eru jólini úti. Tjúgunda kvøld hevur verið hildið sum høgtíðsdagur onkustaðni í Føroyum. Dagurin verður í álmanakkanum eisini róptur Hilarius, til minnis um ein biskup í Poitiers, ið var mettur høgt sum kirkjulærari og sálmaskald. Hann hevur yrkt sálmin. Tær Guð, sum ein ræður himni á. Hilarius doyði í árinum 367

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið Sosialin -so eru tit við!